# Bygdarráðsfundur

## Hvalbiar Kommuna

**Dagfesting:** 19.09.2022 kl. 17.30

Á fundi: Janus Thomsen
Ronni Hammer
Niels Olaf Eyvindsson
Eir J. Norðberg
Gunnhild Mortensen
Thorstein Thomsen
Poul Laust Christiansen (fyri Martin í Nesi)

Ikki møtt: Martin í Nesi

Skrivari: Johanna B. Djurhuus

1. **102-88-2022: Val av garðaskoðara í Hvalba.**
   Thorstein Thomsen hevur skrivliga boðað frá, at hann ynskir at verða loystur frá uppgávuni sum garðaskoðari í Hvalba.
   **Avgerð**:
   Samtykt varð einmælt at útseta málið til komandi fund.

2. **102-89-2022: Umsókn um marknaumskipan – matr. nr. 178c og 178a, Hvalba.**
   Søkt verður um, at matr. nr. 178c letur umleið 71 m2 til matr. nr. 178a, sum hinvegin letur umleið 71 m2 til matr. nr. 178c.
   **Avgerð:**
   Samtykt varð einmælt at viðmæla umsóknini um marknaumskipan.

3. **102-90-2022: Umsókn um hýruvognsloyvi.**
   Søkt verður um hýruvognsloyvi í Hvalba. Umsóknin verður viðgjørd eftir Kunngerð nr. 33 frá 30. mars 1983 um eina standard hýruvognsreglugerð, sum broytt við Kunngerð nr. 139 frá 7. desember 1990.
   **Avgerð:**
   Samtykt varð einmælt av játta hýruvognsloyvi, treytað av, at øll onnur loyvi eru í lagi.

4. **102-78-2022: Skúlabarnaflutningur innan kommunu.**
   **Trivnaðarnevndin 11.09.2022:**
   Nevndin mælir til, at Eir J. Norðberg kannar, um MP Bussar, Poulsen Bussar og Fámjins Bygdaleið eru sinnaðir at lata inn tilboð at koyra skúlabørnini til svimjing og breytir á Tvøroyri mikudag og

fríggjadag. Nevndin mælir til, at skipanin við hýruvognskoyring heldur fram skúlaárið 2022/2023.
**Fíggjarnevndin 19.09.2022:**
Nevndin er samd um at halda fram við hýruvognskoyring hetta skúlaárið og at koyringin til svimjing og breytir á Tvøroyri verður boðin út av nýggjum.
**Avgerð:**
Samtykt varð einmælt at fylgja tilmælunum hjá nevndunum um, at skúlabørnini í Nesi verða koyrd við hýruvogni hetta skúlaárið. Viðvíkjandi koyring til svimjing og breytir, varð samtykt at fylgja tilmælinum hjá Fíggjarnevndini og bjóða hesa koyring út av nýggjum.

5. **102-45-2021: Umsókn um byggiloyvi til terassu og rampu.**
Søkt verður um loyvi at byggja terassu og rampu á matr. nr. 129b, leigað frá Hvalbiar Kommunu.
**Tekniska nevnd 18-09-2022:**
Nevndin mælir til at geva loyvi til bygging av terassu, um bygt verður sambært innlatnum tekningum.
**Avgerð:**
Samtykt varð einmælt at fylgja tilmælinum hjá nevndini og geva byggiloyvi sambært umsókn, givnum upplýsingum og tekningum, treytað av, at byggingin verður framd í fullum samsvari við hjálagda byggiloyvi.

6. **102-81-2022: Umsókn um broyting í byggisamtyktini.**
Umsókn um, at matr. nr. 131d í Hvalba verður broytt frá J: Landbúnaður til B: Sethúsaøki.
**Tekniska nevnd 18.09.2022:**
Samtykt varð einmælt at mæla til, at umsóknin verður gingin á møti.
**Avgerð:**
Einmælt samtykt at ganga umsóknini á møti.

7. **102-84-2022: Skriv um trupulleikar av regnvatni.**
Skriv viðv. stoyping av vegi, har grannaognin hevur trupulleikar av regnvatni, ið ikki sleppur at renna frá.
**Tekniska nevnd 18.09.2022:**
Nevndin mælir til at finna eina loysn á trupulleikanum annaðhvørt við at grava ella við at trýsta /spula rør gjøgnum vegin.
**Avgerð:**
Samtykt varð einmælt at fylgja tilmælinum hjá nevndini.

8. **Ikki alment mál.**

Fundarbókin lisin og skrivað undir. Fundur lokin kl. 18.20